# Eingin føroyingar var á vøllinum alla tíðina

**Fremad Amager lætti sær eitt sindur upp um strikuna, Vejle er á niðuflytingarkós, og hjá Horsens sær nú betri út aftur**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gongur ikki alt ov væl hjá teimum trimum føroysku spælarunum í Fremad Amager. Sunnudagin var Hjalgrím Elttør ikki í besta hópinum. Andrew av Fløtum var á beinkinum og slapp framat, tá ið tað restaðu 23 minuttir. Jann Ingi Petersen spældi fyrsta tíman, so varð hann skiftur út.

Fremad Amager vann 3–1 á botnliðnum B1913. Talan var um fyrsta sigurin á heimavølli í átta mánaðir. Stutt undan steðginum, tá ið støðan var 2–1, fekk Jann Ingi Petersen møguleika at økja um leiðsluna. Men stutt úr málinum tøvdi hann sambært heimasíðuni hjá felagnum eitt vet ov leingi, og so varð hann takladur.

Í Vejle hava teir stórar ætlanir. Teir tosa um at byggja nýtt stadion fyri meiri enn hundrað milliónir, og teir hava fingið vinnuna í økinum at seta nógvar milliónir í felagið. Á vøllinum gongur tað skeiva vegin. Sunnudagin høvdu teir í Vejle vitjan av Silkeborg, sum er sannførandi oddalið. Hesa ferð vunnu teir 3–0. Næsta vikuskifti skal Silkeborg spæla ímóti Randers. Um teir vinna tann dystin, so verður leiðin hjá Silkeborg sløtt aftur í bestu deildina, sum teir í fjør fluttu niður úr.

Johan B. Hansen og Horsens hava í vár søplað trygga oddasessin burtur. Nú eru teir aftur omanfyri strikuna. Tað eru teir partvís, tí kappingarneytarnir úr Randers leygardagin bara megnaðu 2–2 ímóti Fredericia, og tí teir sjálvir í Århus vunnu 1–0 ímóti FC Aarhus, sum tykist vera á veg niður í triði bestu deildina. B1913 er longu fokið. Spurningurin er, um Vejle verður triði niðurflytarin.

*Framhald av síðu 27*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 11 | Gunnvá Egholm | 1968 | 35 | 7 |
| 12 | Jóngerð Høgnesen | 1948 | 35 | 41 |
| 13 | Morid Jacobsen | 1965 | 35 | 51 |
| 14 | Ingrid Bærentsen Patursson | 1958 | 35 | 52 |
| 15 | Brindis Weihe | 1968 | 36 | 40 |
| 16 | Laila Súsanna Jacobsen | 1962 | 37 | 2 |
| 17 | Marjun Persson | 1985 | 37 | 31 |
| 18 | Karina Magnussen | 1972 | 37 | 33 |
| 19 | Sólfríð Fjallsbak | 1977 | 37 | 41 |
| 20 | Durita Rasmussen | 1956 | 37 | 46 |
| 21 | Hildigunn Niclasen | 1985 | 37 | 49 |
| 22 | Ann Østerø | 1967 | 37 | 54 |
| 23 | Nina Djurhuus | 1965 | 38 | 5 |
| 24 | Arndis Andreasen | 1983 | 38 | 20 |
| 25 | Marita Simonsen | 1961 | 38 | 27 |
| 26 | Gunnrið Jóanesarson | 1972 | 38 | 34 |
| 27 | Hansina á Plógv | 1953 | 38 | 36 |
| 28 | Durita Djurholm | 1967 | 39 | 59 |
| 29 | Súsanna Danielsen | 1952 | 40 | 4 |
| 30 | Fríða Rasmussen | 1983 | 40 | 27 |
| 31 | Torgunn Gásdal | 1983 | 40 | 30 |
| 32 | Birgit Eckeroth | 1951 | 40 | 51 |
| 33 | Gyða Skaale Johansen | 1981 | 41 | 18 |
| 34 | Anna Maria Jespersen | 1982 | 41 | 37 |
| 35 | Karin Strøm | 1960 | 41 | 49 |
| 36 | Tove Poulsen | 1990 | 42 | 0 |
| 37 | Sigvør Matras | 1963 | 42 | 11 |
| 38 | Bjørt Samuelsen | 1965 | 42 | 51 |
| 39 | Elsa í Skorini | 1949 | 43 | 38 |
| 40 | Lisa Frederiksberg | 1974 | 43 | 43 |
| 41 | Randi Dam Petersen | 1965 | 44 | 5 |
| 42 | Ruth E. Jacobsen | 1968 | 44 | 7 |
| 43 | Hildur Nielsen | 1964 | 44 | 11 |
| 44 | Hervør Eyðunsdóttir | 1960 | 44 | 29 |
| 45 | Óluva Zachariassen | 1979 | 44 | 42 |
| 46 | Marin Katrina Frýdal | 1960 | 45 | 23 |
| 47 | Rósely R. Hansen | 1966 | 45 | 42 |
| 48 | Sunhee K. Durhuus | 1987 | 45 | 58 |
| 49 | Randi Joensen | 1962 | 46 | 0 |
| 50 | Helga Hansen | 1955 | 46 | 4 |
| 51 | Maria Abrahamsen | 1962 | 46 | 10 |
| 52 | Elsba Danielsen | 1962 | 46 | 35 |
| 53 | Marita Næs | 1949 | 46 | 45 |
| 54 | Fanny av Hamri | 1951 | 46 | 45 |
| 55 | Heidi Magnussen | 1968 | 46 | 51 |
| 56 | Sóleyð Hansen | 1979 | 47 | 34 |
| 57 | Jóhanna Midjord | 1950 | 48 | 22 |
| 58 | Ulla Joensen | 1968 | 48 | 42 |
| 59 | Birgit Debess | 1962 | 48 | 54 |
| 60 | Jensia Nolsøe | 1980 | 49 | 31 |
| 61 | Guðrun í Garði | 1963 | 49 | 46 |
| 62 | Katy Klein | 1967 | 49 | 56 |
| 63 | Maria Thorgeirsson | 1982 | 49 | 57 |
| 64 | Anna Simonsen | 1981 | 49 | 58 |
| 65 | Bjørghild Djurhuus | 1953 | 50 | 2 |
| 66 | Henrid Johansen | 1953 | 50 | 9 |
| 67 | Sólrun Vestergaard | 1963 | 50 | 41 |
| 68 | Malan Berg Hansen | 1967 | 50 | 56 |
| 69 | Gunnleyg Durhuus | 1951 | 51 | 38 |
| 70 | Doris Hansen | 1954 | 51 | 52 |
| 71 | Anna Petra Poulsen | 1984 | 52 | 40 |
| 72 | Lene L. Jensen | 1970 | 53 | 8 |
| 73 | Anja Møller | 1980 | 53 | 10 |
| 74 | Elin Danielsen | 1962 | 54 | 8 |
| 75 | Bergtóra í Geil | 1967 | 54 | 25 |
| 76 | Sigrun Samuelsen | 1956 | 54 | 32 |
| 77 | Hannelena Jacobsen | 1945 | 54 | 46 |
| 78 | Barbara Danielsen | 1982 | 55 | 41 |
| 79 | Johild Holm | 1956 | 57 | 2 |
| 80 | Karin Joensen | 1942 | 57 | 3 |
| 81 | Katrin Holm | 1946 | 57 | 12 |
| 82 | Ásbjørg Arge | 1949 | 57 | 21 |
| 83 | Hildur Thomassen | 1953 | 58 | 6 |
| 84 | Oda Brimsvík | 1958 | 58 | 7 |
| 85 | Elsa Maria Hansen | 1958 | 58 | 9 |
| 86 | Elin í Jákupstovu | 1952 | 60 | 1 |
| 87 | Brynhild Poulsen | 1970 | 60 | 1 |
| 88 | Brynhild í Jákupsstovu | 1965 | 60 | 1 |
| 89 | Annika F. Berg | 1971 | 60 | 1 |
| 90 | Lív Lutzen | 1984 | 60 | 2 |
| 91 | Tórgerð Hentze | 1944 | 60 | 3 |
| 92 | Fríða N. Nielsen | 1985 | 60 | 3 |
| 93 | Olga Knudsen | 1965 | 60 | 3 |

**Veteranar, menn**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Jósvein Herup Olsen | 1958 | 26 | 0 |
| 2 | Sámal H. Debes | 1952 | 27 | 9 |
| 3 | Steindor Hjaltalin | 1949 | 27 | 55 |
| 4 | Ólavur Herup Olsen | 1943 | 29 | 18 |
| 5 | Robert Vilhelmsen | 1951 | 29 | 55 |
| 6 | Evald Rasmussen | 1956 | 30 | 31 |
| 7 | Krisjan Christiansen | 1952 | 31 | 15 |
| 8 | Kristin Rasmussen | 1952 | 31 | 33 |
| 9 | Harry Hansen | 1938 | 31 | 38 |
| 10 | Jógvan Olsen | 1956 | 31 | 54 |
| 11 | Kim Pagels | 1957 | 32 | 18 |
| 12 | Henning Clemens Poulsen | 1951 | 32 | 37 |
| 13 | Asbjørn Mikkelsen | 1956 | 33 | 48 |
| 14 | Hans Birgir Hansen | 1949 | 34 | 36 |
| 15 | Suni Petersen | 1956 | 35 | 18 |
| 16 | Sonni Jensen | 1958 | 35 | 43 |
| 17 | Tommy Jensen | 1953 | 36 | 27 |
| 18 | Volmar Højgaard | 1957 | 36 | 34 |
| 19 | Regin Jóanesarson | 1945 | 36 | 40 |
| 20 | Sørin Christiansen | 1956 | 37 | 45 |
| 21 | Hans Pauli Strøm | 1956 | 38 | 10 |
| 22 | Mortan A. Carlsen | 1958 | 38 | 14 |
| 23 | Eivind Danielsen | 1955 | 38 | 40 |
| 24 | Ingi Vestergaard | 1958 | 39 | 15 |
| 25 | Álvur Oknadal | 1957 | 39 | 42 |
| 26 | Tróndur Leivsson | 1957 | 39 | 48 |
| 27 | Óli Simonsen | 1957 | 40 | 0 |
| 28 | Óla Hans A. Olsen | 1956 | 40 | 4 |
| 29 | Páll Beder1953 | 40 | 18 | |
| 30 | Jørgen Jacobsen | 1955 | 40 | 34 |
| 31 | Helgi á Fløtti | 1950 | 41 | 16 |
| 32 | Niels Christian Nolsøe | 1958 | 42 | 0 |
| 33 | Pætur Bærentsen | 1951 | 43 | 43 |
| 34 | Høgni Djurhuus | 1948 | 45 | 17 |
| 35 | Magni Dalsgaard | 1951 | 46 | 18 |
| 36 | Ingibjartur Madsen | 1935 | 49 | 39 |
| 37 | Jens Marius Poulsen | 1942 | 49 | 49 |
| 38 | Oskar Neshamar | 1953 | 51 | 1 |
| 39 | Pætur Háberg | 1955 | 53 | 24 |
| 40 | Ásmund Johannesen | 1943 | 54 | 45 |
| 41 | Jón Á. Ásgeirsson | 1955 | 55 | 13 |

**Veteranar, kvinnur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Jóngerð Høgnesen | 1948 | 35 | 41 |
| 2 | Ingrid Bærentsen Patursson | 1958 | 35 | 52 |
| 3 | Durita Rasmussen | 1956 | 37 | 46 |
| 4 | Súsanna Danielsen | 1952 | 40 | 4 |
| 5 | Birgit Eckeroth | 1951 | 40 | 51 |
| 6 | Elsa í Skorini | 1949 | 43 | 38 |
| 7 | Helga Hansen | 1955 | 46 | 4 |
| 8 | Marita Næs | 1949 | 46 | 45 |
| 9 | Fanny av Hamri | 1951 | 46 | 45 |
| 10 | Jóhanna Midjord | 1950 | 48 | 22 |
| 11 | Bjørghild Djurhuus | 1953 | 50 | 2 |
| 12 | Henrid Johansen | 1953 | 50 | 9 |
| 13 | Gunnleyg Durhuus | 1951 | 51 | 38 |
| 14 | Doris Hansen | 1954 | 51 | 52 |
| 15 | Sigrun Samuelsen | 1956 | 54 | 32 |
| 16 | Hannelena Jacobsen | 1945 | 54 | 46 |
| 17 | Johild Holm | 1956 | 57 | 2 |
| 18 | Karin Joensen | 1942 | 57 | 3 |
| 19 | Katrin Holm | 1946 | 57 | 12 |
| 20 | Ásbjørg Arge | 1949 | 57 | 21 |
| 21 | Hildur Thomassen | 1953 | 58 | 6 |
| 22 | Oda Brimsvík | 1958 | 58 | 7 |
| 23 | Elsa Maria Hansen | 1958 | 58 | 9 |
| 24 | Elin í Jákupstovu | 1952 | 60 | 1 |
| 25 | Tórgerð Hentze | 1944 | 60 | 3 |

**Dreingir**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Remi Langgaard | 1991 | 5 | 49 |
| 2 | Jan Elmar Sørensen | 1991 | 6 | 2 |
| 3 | Brian Vang | 1991 | 6 | 16 |
| 4 | Ari Johannesen | 1992 | 6 | 37 |
| 5 | Rúni Seloy | 1994 | 6 | 46 |
| 6 | Jákup Toftum Joensen | 1992 | 6 | 50 |
| 7 | Reidar Luid | 1991 | 6 | 58 |
| 8 | Høgni Olafsson | 1993 | 7 | 2 |
| 9 | Tóri Debes | 1992 | 7 | 10 |
| 10 | Rói Agnarson | 1991 | 7 | 11 |
| 11 | Høgni Miné-Rasmussen | 1992 | 7 | 12 |
| 12 | Olivur Debes Eiriksfoss | 1992 | 7 | 18 |
| 13 | Ragnar Khaliqhey | 1994 | 7 | 23 |
| 14 | Teitur Magnusson | 1991 | 7 | 25 |
| 15 | John Viljam Johannesen | 1995 | 7 | 26 |
| 16 | Hákun Hansen | 1992 | 7 | 27 |
| 17 | Teitur Guttesen | 1994 | 7 | 29 |
| 18 | Tóri Jacobsen | 1993 | 7 | 29 |
| 19 | Mikkjal Christiansen | 1993 | 7 | 30 |
| 20 | Ári Hansen | 1993 | 7 | 34 |
| 21 | Símun Hentze Vestergaard | 1992 | 7 | 35 |
| 22 | Torkil Petersen | 1992 | 7 | 39 |
| 23 | Magnus Berg Lund | 1994 | 7 | 42 |
| 24 | Rógvi H. Christiansen | 1993 | 7 | 44 |
| 25 | Jóhan Kristiansen | 1992 | 7 | 50 |
| 26 | Regin Joensen | 1995 | 8 | 0 |
| 27 | Hugin á Borg Ferber | 1995 | 8 | 1 |
| 28 | Beinir Johannesen | 1997 | 8 | 2 |
| 29 | Julian Dahl Thomsen | 1996 | 8 | 3 |
| 30 | Páll R. Weihe | 1995 | 8 | 4 |
| 31 | Jógvan Johannesen | 1992 | 8 | 5 |
| 32 | Ólavur Joensen | 1996 | 8 | 19 |
| 33 | Karl Martin Ei. Danielsen | 1995 | 8 | 23 |
| 34 | Kim Karmalsson Durhuus | 1992 | 8 | 26 |
| 35 | Símun Johannesen | 1994 | 8 | 26 |
| 36 | Jamin Linduson Zhang | 1994 | 8 | 32 |
| 37 | Hørður Hentze johansen | 1995 | 8 | 33 |
| 38 | Steingrímur Hallsson | 1997 | 8 | 40 |
| 39 | Fróði Dam | 1992 | 8 | 41 |
| 40 | Jonas Drews Hjaltalin | 1993 | 8 | 43 |
| 41 | Bjørn Rein | 1993 | 8 | 44 |
| 42 | Eindri Tróndarson | 1994 | 8 | 54 |
| 43 | Rógvi Helgi Skaalum | 1995 | 9 | 3 |
| 44 | Hanus Jóhansson | 1996 | 9 | 5 |
| 45 | Helgi Hansen | 1993 | 9 | 7 |
| 46 | Neli Heldarskarð | 1996 | 9 | 35 |
| 47 | Hans Pauli Hansen | 1995 | 9 | 45 |
| 48 | Aksel Flagstad Berg | 1996 | 9 | 50 |
| 49 | Ian C.S. Jensen | 1992 | 9 | 51 |
| 50 | Petur Pauli Petersen | 1996 | 9 | 55 |
| 51 | Patrick T.S. Jensen | 1994 | 10 | 8 |
| 52 | Ragnar Kruse | 1997 | 10 | 22 |
| 53 | Mortan B. Petersen | 1997 | 10 | 28 |
| 54 | Osvald Hansen | 1992 | 10 | 42 |
| 55 | Regin S. Kunoy | 1996 | 10 | 43 |

*Framhald á síðu 29*



# Todi átti næstsíðsta fótin

**Tá ið hann sá liðfelagarnar tapa í Århus, var Jákup á Borg nærri besta OB liðnum, enn hann hevði verið frammanundan**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*



*Jákup á Borg kom í vikuskiftinum nærri besta liðnum hjá OB. Sunnudagin sat hann á beinkinum allan dystin ímóti AGF*

Nú tað resta sjey umfør, er tað greitt, at tað bara eru trý feløg við í kappingini um heiðursmerkini. OB tapti 1–0 í Århus, og harvið eru teir burtur úr oddastríðnum.

Jákup á Borg var fyri fyrstu ferð við besta OB liðnum, men hesa ferð slapp hann ikki longri enn á beinkin. Hjá AGF var talan um fyrsta sigurin í ár.

Nógv hevur verið gjørt burturúr, at miðvallarveteranarnir Brian Steen Nielsen og Stig Tøfting ongantíð høvdu vunnið, tá ið teir í senn vóru á AGF miðvøllinum. Hagtølini siga, at hetta var trettanda ferðin, at teir spældu saman á AGF liðnum, og hetta var fyrsta ferðin, at teir saman vóru við til at fáa fult í AGF búna.

Todi Jónsson var í FCK álopinum í 80 minuttir. So loysti Thomas Røll hann av. 22.117 áskoðarar kundu staðfesta, at FCK enn eina ferð hevði ilt við at fáa úrtøku burturúr stórari yvirvág á heimavølli ímóti einum av niðast staddu liðunum.

Herfølge kom í Parkina við nýggjum venjarapari. Johnny Petersen segði upp fríggjadagin. Nú høvdu gomlu landsliðsmenninir Allan Nielsen og Michael Schjønberg ábyrgdina. Teir sóu Anders Jochumsen, sum var minsti maður á vøllinum, við høvdinum leggja Herfølge framum í 16. minutti. Herfølge pakkaði seg ikki saman í egnum brotsteigi, men tað mesta gekk fyri seg har á leið.

Todi Jónsson átti uppleggið til útjavnandi málið, sum miðvallarin Morten Bisgaard skoraði, tá ið ein hálvur tími var farin. Innarlaga í brotsteiginum í høgru fekk Todi bóltin. Við bakinum ímóti málinum bíðaði hann eina løtu, so legði hann aftur ímóti brotsteigarmarkinum til miðvallaran, sum smekkaði flatt í kassan. So royndi og royndi FCK, men teir fingu ikki mál.

– Eg eri betri nøgdur við avrikið hjá mær hesa ferð, enn eg var ímóti AB. Tað kennist sum formurin er betri nú. Men sjálvandi er tað harmuligt, at vit ikki megna at vinna. Tað verður roknað við, at vit, sum eru í álopinum, skora mál. Hesa ferð hevði eg ongan málmøguleika, sigur Todi Jónsson, sum nú hevur lagt upp til tvey mál í tveimum dystum.

Eftir 2–0 sigurin á útivølli ímóti AB var FCK venjarin, Hans Backe, hvassorðaður við sínar spælarar, sum hann helt høvdu verið ov lítið nærlagdir. Hesa ferð var FCK venjarin vinsælari ímóti sínum undirsáttum.

– Vit hava í vár tikið átta stig og sjey mál inn á Brøndby. Esbjerg er fremst, men vit skulu spæla ímóti teimum, og eg rokni við, at FCK fer at endurvinna meistaraskapin, segði FCK venjarin.

### Misjavnt hjá kappingarneytunum

Leygardagin fekk Brøndby einki í Viborg. Tá ið tað var hálvleikt, var tað mállleyst. Eftir steðgin skoraði heimaliðið tríggjar ferðir, áðrenn Brøndby fekk hol á. Tá ið teir minkaðu um munin til 3–2, var tíðin um at vera farin.

Esbjerg legði seg á fremsta plássið, tá ið teir í Gladsaxe vunnu 5–2 á AB, sum nú má mestast at vera fokið. Esbjerg venjarin, Ove Pedersen, var ovurfegin um, at liðið hjá honum nú tykist hava tryggjað sær fyrstu heiðursmerkini í mong ár. Tað ber við sær, at teir nú kunnu spæla frítt og dyrgja eftir gullinum, segði glaði venjarin. Esbjerg er fremst og átta stig frammanfyri OB á fjórða plássinum.

### Tungt hjá uppflytarunum

At Herfølge fekk stig í Parkini, og at AGF fekk fult á heimavølli hevði við sær, at tað sær uppaftur ljótari út hjá teimum, sum frammanundan lógu tungt í sjónum. Frem hevði vitjan av AaB, sum í síðstu viku upplivdi turbulens, tí tveir av lyklaspælarunum – málverjin Jimmy Nielsen og álopsspælarin David Nielsen – ásannaðu, at teir í veddingarspølum hava sent bæði seg og onnur í fíggjarligt óføri.

AaB vann 1–0, og harvið versnaðu vánirnar hjá Frem. Vónin hjá teimum er eitt nú knýtt at, hvussu tað hilnast hjá FC Nordsjælland. Hesa ferð vóru sjællendararnir í Herning, har heimaliðið vann 3–0. Egyptiski landsliðsspælarin Mohammed Zidan skoraði enn eina ferð. Í trimum dystum á nýggja stadion hjá FCM hevur hann skorað níggju mál.

Næsta vikuskifti er møguleiki fyri, at Todi Jónsson og Jákup á Borg skulu spæla ímóti hvørjum øðrum. FCK skal til Odense. Hinir dystirnir eru hesir: AaB-AB, Brøndby–AGF, Esbjerg–Viborg, FCN–Frem og Herfølge–FCM.

## Smiðjurin er fegin

Føroysku útisetarnir í Fremad Amager hava í øllum førum fingið sær ein nýggjan vin, nú teir royna seg í felagnum.

Tey, sum plaga at lesa í danska Tips-Blaðnum, vita helst, at Tavse Tipper Thomsen plagar at fara út í kolonihavastykkið á Amager, tá sólin er farin at hita, og at hann her hevur mangar góðar løtur saman við Smiðinum, sum eisini plagar at vera har.

Í vár hevur tó verið nakað øðrvísi. Smiðjurin hevði svorið dýran við, at hann ikki kom út, fyrr enn Fremad Amager hevði vunnið dyst aftur, og fram til seinasta vikuskiftið hevði Thomsen heldur ikki sæð nakað sum helst til hansara, men hetta broyttu føroyingarnir.

Andrew og Jann Ingi vóru málskjúttarnir, tá Fremad vann útidystin móti FC Aarhus, og so var lag á gamla.

Í seinastu fríggadagsútgávuni skrivar Thomsen, at seinast hann sá Smiðin, var tá hann stuðlaði honum út til ein taxa-bil, og einastu orðini, sum tá komu úr honum, vóru »Forza Fremad, Forza Færøerne«.

Hvussu lagið nú er á Smiðinum eftir næsta Fremad-sigurin á rað, er enn ikki greitt, men tað er lítið at ivast í, at Tavse Tipper Thomsen longu komandi fríggjadag fer at vena seg nakað um gangin, sum grannin nú er farin at halda.

**-jm**

*Framhald av síðu 28*

**Gentur**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | 6 | 13 |
| 2 | Katrina Christiansen | 1991 | 6 | 48 |
| 3 | Sólja Christiansen | 1991 | 6 | 50 |
| 4 | Kristianna Dal Jákupsdóttir | 1991 | 7 | 8 |
| 5 | Rannvá Djurholm | 1992 | 7 | 31 |
| 6 | Rakul Joensen | 1992 | 7 | 42 |
| 7 | Helena G. Jacobsen | 1993 | 7 | 43 |
| 8 | Rebekka á N Jacobsen | 1991 | 7 | 44 |
| 9 | Kára Bjarnadóttir Jakobsen | 1992 | 7 | 46 |
| 10 | Monika Djurholm | 1991 | 8 | 7 |
| 11 | Vilbjørg Johannesen | 1992 | 8 | 13 |
| 12 | Lív Arge | 1993 | 8 | 19 |
| 13 | Sóldís Petersen | 1992 | 8 | 32 |
| 14 | Annika L.-Mortensen | 1993 | 8 | 38 |
| 15 | Eydna Ei. Danielsen | 1993 | 8 | 44 |
| 16 | Marjun Reginsdóttir | 1994 | 8 | 45 |
| 17 | Joan Dam Petersen | 1992 | 8 | 46 |
| 18 | Sissal Skaale | 1994 | 8 | 49 |
| 19 | Ebba Malena D. Thomsen | 1991 | 8 | 50 |
| 20 | Fjóla Luid | 1992 | 8 | 52 |
| 21 | Fríða V. Jakobsen | 1991 | 8 | 55 |
| 22 | Elin Maria Brekkstein | 1992 | 8 | 55 |
| 23 | Guðrið Justinussen | 1992 | 9 | 1 |
| 24 | Jona á Váli Olsen | 1992 | 9 | 10 |
| 25 | Milja Magnussen | 1999 | 9 | 15 |
| 26 | Gerda Heldarskarð | 1994 | 9 | 19 |
| 27 | Lea Arge | 1995 | 9 | 20 |
| 28 | Sanna Mohr | 1993 | 9 | 20 |
| 29 | Magdalena Haraldsen | 1991 | 9 | 21 |
| 30 | Æsa Tróndardóttir | 1993 | 9 | 32 |
| 31 | Maria B. Jakobsen | 1996 | 9 | 37 |
| 32 | Ingibjørg Petersen | 1995 | 9 | 38 |
| 33 | Ásla Berg 1993 | 9 | 45 | |
| 34 | Sissal Drews Hjaltalin | 1996 | 9 | 47 |
| 35 | Jenny Jónasóttir Kragesteen | 1993 | 9 | 49 |
| 36 | Kristina Brekkstein | 1993 | 9 | 53 |
| 37 | Gunnvá G. Jacobsen | 1995 | 9 | 54 |
| 38 | Svanna Trygvadóttir | 1996 | 9 | 54 |
| 39 | Jórunn Reginsdóttir | 1993 | 9 | 55 |
| 40 | Vígdis Joensen | 1993 | 9 | 56 |
| 41 | Maiken Olsen | 1990 | 10 | 12 |
| 42 | Gunnhild Árnadóttir | 1994 | 10 | 13 |
| 43 | Elsa Johansen | 1995 | 10 | 17 |
| 44 | Una Súsanna Skaalum | 1994 | 10 | 20 |
| 45 | Maria Johannesen | 1993 | 10 | 22 |
| 46 | Lilja Luid | 1995 | 10 | 25 |
| 47 | Margret Heldarskarð | 1992 | 10 | 37 |
| 48 | Anna Poulsen | 1995 | 11 | 20 |
| 49 | Anita Djurhuus | 1993 | 11 | 25 |
| 50 | Marianna G. á Skúr | 1993 | 11 | 26 |
| 51 | Paula Leitisstein Olsen | 1993 | 11 | 28 |
| 52 | Sylvia Ellingsgaard | 1995 | 11 | 41 |
| 53 | Dagmar Johannesen | 1994 | 11 | 50 |
| 54 | Rannvá Magnussen | 1997 | 11 | 51 |
| 55 | Una Arge Galan | 1997 | 11 | 55 |
| 56 | Rannvá G. Joensen | 1994 | 11 | 56 |
| 57 | Milja Skaale | 1996 | 11 | 57 |
| 58 | Katharins D.-Jakobsen | 1997 | 12 | 0 |
| 59 | Sólvá Hjaltalin Olsen | 1994 | 12 | 41 |
| 60 | Svanna Christiansen | 1997 | 13 | 30 |